# Sjálvstýrisflokkurin




# SJÁLVSTÝRI

Á fólkatingsvalinum 13. november stilla vit upp fyri Sjálvstýrisflokkin.

Sjálvstýrisflokkurin ætlar sær á Fólkatingi at halda seg burtur frá donskum politikki.

Floksins umboðan fer fyrst og fremst at virka fyri størri føroyskari ávirkan á egin viðurskifti.

Eisini fara vit at leggja dent á at verja Føroyar móti politiskum ágangi úr Danmark.

Føroyar og føroyingar eiga ómissandi sjálvsavgerðarrætt. Henda rætt mugu vit standa saman um og verja. Mótvegis dønum mugu vit greiða frá støðu okkara og halda fast við rættindi okkara.

Vit fara ikki til Danmarkar at biða um loyvi at samtykkja egna grundlóg ella at fremja tær yvirtøkur, sum longu eru nevndar í heimastýrislóg og yvirtøkulóg.

Men vit fara til Danmarkar at greiða dønum frá, at vit eiga rættin sjálvi at mynda okkara egnu grundlóg, rættarskipan og lóggávu á okkara málsøkjum, uttan at danir leggja seg út í hesi viðurskifti.

## FØROYINGAR RÁÐA

Vit fara til Danmarkar at krevja okkara rætt, tá ið umræður altjóða umboðan. So leingi vit eru í samveldi við Danmark, noyðast vit at vera felags um summar altjóða sessir. Støða okkara í altjóða høpi velst tó ikki um danskar lærubøkur, men heldur um, hvat onnur lond taka undir við út frá støðu og umdømi okkara.

Vit fara at halda fram at krevja limaskap í Norðurlandaráðnum. Vit fara at krevja limaskap ella atlimaskap ella aðra nøktandi skipan í teimum altjóða stovnum, har áhugamál føroyinga verða viðgjørd.

Á sama hátt sum vit hava fingið atlimaskap í altjóða stovninum fyri trygd á sjónum, IMO, skulu vit fáa nøktandi støðu í altjóða stovnum fyri matvøru, arbeiðsmegi, hvalaveiði og ítrótt.

Vit fara ikki at lata okkum siga, at løgfrøðiligar forðingar eru, tí løgfrøðin fylgir bert eftir, har politikkurin slóðar fyri.

Vit fara at krevja javnbjóðis og virðilig viðurskifti í øllum lutum. Ríkisumboðið skal vera føroyingur, soleiðis at danir fáa nøktandi kunning, so at ríkisumsitingin í Føroyum verður á føroyskum, og so at umboðið fyri stjórn og kongshús kann røða á føroyskum í Føroyum.

## FØROYINGAR LIVA

Vit verða manga spurd, hvørjum føroyingar skulu liva av, um vit ikki hava blokkin? Vit eru sannførd um, at tað er fáfongd og stór vanlukka, um vit skulu liva av tí, ið onnur hava havt stríðið av. Vit føroyingar liva av, at vit eru dugnalig, væl útbúgvin og duga at laga okkum til skiftandi viðurskifti. Tí mugu vit leggja doyðin á at menna føroyska útbúgving, gransking og endurbúgving, so øll kunnu vera við í búskapi og menning.

Heimastýristíðin fer at renna undan, og tíðin fer frá blokki og donskum loysnum í Føroyum.

Sjálvstýrisflokkurin vil virðilig viðurskifti, ta tíð vit enn eru í samveldi við Danmark, men samvinnan framyvir má byggja á, at vit fyrireika Føroyar sum sjálvstøðugt land.

Stig fyri stig skulu Føroyar førleikamennast til at vera land við øllum stovnum og skipanum, ið neyðugar eru, eisini við egnari grundlóg og egnum limaskapi í altjóða stovnum.

At fremja hesi mál, at menna føroyskt sjálvræði, at sannføra um føroysk sjónarmið, at fyrireika framtíðar framburð í altíða høpi, bjóða vit okkum fram at umboða Føroyar og føroyingar á Fólkatingi.

**VELJIÐ SJÁLVSTÝRI**

WWW.SJALVSTYRI.FO